# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vaksandi tilvit um skaðilig útlát

Skaðiliga árinið av útláti fra ídnaðarlondunum er vorðið alt meira eygsýnligt. Um allan heimin kenna fólk nú sviðan av, at ídnaður og bilar hava latið ómetaligar mongdir av $CO_2$ gassum út í luftina. Úrslitið er, sum øllum kunnugt, at veðurlagið broytist. Tað verður sum heild heitari og úrslitið verður, at sera ógvusligar broytingar henda við veðrinum. Hetta merkist longu víða hvar, har ódnir, glopprraregn og vatnflóð, skógareldar og skriðulop koma fyri á ein heilt nýggjan og ógvusligari hátt enn mannaættin áður hevur sæð.

Kyoto sáttmálin áleggur øllum londum, sum taka undir við hesum sáttmála at minka um útlátið av skaðiligum gassum. Men nógv bendir á, at hetta er ikki nóg munagott. Her skal annað og meira til. Málið er vorið sera aktuelt í Europa og serstakliga í Norðurlondum. Í løtuni er ES toppfundur um hetta álvarsama evni.Danmark og onnur ES lond skjóta nú upp, at í 2020 skal øll orkunýtsla í ES-londunum stava frá varandi orkukeldum. Í dag skulu ríkis- og stjórnarleiðararnir í ES-londunum taka støðu til, hvussu stóran dent ES skal leggja á at brúka varandi orkukeldur.

Týskland, Danmark og onnur lond skjóta upp, at í 2020 skulu 20 prosent av orkuni koma frá varandi orkukeldum, og at hendan ásetingin skal vera bindandi. Men fleiri lond, teirra millum tey eysturevropeisku, eru ímóti uppskotinum. Týski kanslarin, Angela Merkel, segði í gjárkvøldið, at hon fer at gera sítt ítarsta fyri at fáa uppskotið um tey 20 prosentini samtykt.

Tað er altumráðandi, at ES, sum á mongum økjum er slóðbrótari innan grønan búskap, grøna orku og umhvørvi, kann finna semju um munadygg tiltøk. Her er brúk fyri eini langtrøkkandi strategi, sum veruliga kann tryggja, at skaðiliga útlátið minkar. Hendir hetta ikki her og nú, so fara okkara eftirkomarar at liva í einum heimi, sum verður eyðkendur av náttúruvanlukkum og ómetaliga truplum búskapaligum viðurkskiftum. Vit eiga eisini at gera okkara. Herfyri var stórfingin ráðstevna á Norðurbryggjuni í Keypmannhavn, har eisini føroyingar tóku lut. Her gekk sjón fyri søgn, at nakað munagott eigur at verða gjørt her í Norðuratlantshavi til tess at tryggja umhvørvi og verja okkum móti ógvusligum veðurlagsbroytingum. Nú er at smíða, meðan jarnið er heitt.

**Sosialurin**

# Íbúðarbyggingin á Hamrinum á Argjum



**HEÐIN MORTENSEN**
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu

### Aftursvar til Høgna Mikkelsen

Í lesarabrævi fyri viku síðani sóknast býráðslimurin Høgni Mikkelsen eftir broyttu reglugerðini fyri útlutan av randarhúsum og íbúð-um. Í tráan síni eftir at fortelja Føroya fólki, hvussu harmur hann er um, at Tórshavnar kommuna ikki vísir borgarunum nóg stóra virðing, leggur Høgni Mikkelsen heldur harðliga og ósakliga eftir borgarstjóranum og partvíst eisini umsitingini hjá Tórshavnar kommunu.

Í hesum føri er orsøk til at leggja nakrar ítøkiligar upplýsingar aftrat tí, hann førir fram, so borgarar í Tórshavnar kommunu eisini fáa neyðugu kunningina um rætta samanhangin í málinum, umframt um aðrar partar av veruleikanum, sum Høgni Mikkelsen eftir øllum at døma letur verða við at nevna í lesarabrævinum.

Vanligt er, at Tórshavnar kommuna tryggjar sær, at borgarar á bíðilistanum hjá kommununi fáa rætt at keypa, tá almenn ella kommunal jørð verður seld privatum at byggja á. So varð eisini gjørt í sambandi við íbúðarbyggingina á Hamrinum á Argjum, og hesum visti byggifyritøkan av, áðrenn farið varð í gongd.

Tí má staðfestast, at er byggifyritøkan komin í fíggjarliga trongstøðu av hesi bygging, sum skjøtil varð settur á fyri bert einum mánaði síðani, má okkurt vera galið við øðrum grundleggjandi viðurskiftum hjá fyritøkuni. Um so er, er hetta kanska eitt kærkomið høvi at gera reglugerðina hjá kommununi fyri útlutan av randarhúsum og íbúðum til syndabukk.

Her er vert at leggja aftrat, at tá Pf. Høgni Mikkelsen fyri fáum árum síðani bygdi íbúðir oman fyri Berjabrekku, var tað eftir júst somu treytum, sum nú verður bygt á Hamrinum á Argjum. Í tí sambandi kundi Høgni Mikkelsen hóskandi fortalt borgarunum í kommununi, hvussu nógvar av hesum íbúðum hann seldi umvegis bíðilistan hjá kommununi. Satt at siga, er ringt at fáa eyga á, at Pf. Høgni Mikkelsen sýndi stórvegis virðing fyri teimum borgarum, ið tá stóðu á kommunala bíðilistanum.

Viðvíkjandi íbúðarbyggingini kann verða upplýst, at borgarstjórin og umsitingin hjá kommuni saman við tveimum dugnaligum uttanhýsis løgfrøðingum hava arbeitt við at betrað reglugerðina fyri bíðilistar og útlutan. Eingin ivi man vera um, at tey mongu, ið upplivdu trupulleikar av gomlu reglugerðini, kunnu fegnast um at fáa eina broytta og betraða reglugerð. Tað er í størstan mun fyri at sýna borgarunum virðing, at reglugerðin verður broytt.

Uppskotið til reglugerð varð tann 23. februar 2007 sent øllum býráðslimum, herundir eisini Høgna Mikkelsen, so teir kundu koma við sínum viðmerkingum, men enn hevur Høgni Mikkelsen eftir hesi mannagongd ikki gjørt eina einastu viðmerking til uppskotið. Tí er eisini ilt at skilja, hvør ætlan hansara er við nevnda lesarabrævi, tí tað stendur beinleiðis í andsøgn til ta sannroynd, at hann sum býráðslimur yvirhøvur ikki hevur roynt at gjørt sína ávirkan galdandi í sambandi við nevndu reglugerð.

# Kvøldseta á Studentaskúlanum á Kambsdali



**Kambsdalur:** Mánakvøldið, 12. mars verður almenn kvøldseta í Studentaskúlahøllini á Kambsdali. Vanliga eru tvær kvøldsetur hvørt skúlaár – ein um heystið og ein um várið. Hendan grækarismessukvøldseta, sum er tann seinna í ár, byrjar kl. 19.30

Á skránni er felagssangur, næmingaframløga, klumman hjá Meinhardi Jensen, nógvur og góður tónleikur frá næmingum, umframt at Hanna Vang, almennur ákæri, hugleiðir um førning og førleika úr Studentaskúlanum.

Kvøldsetan er ein góður møguleiki at fáa eitt áhugavert og hugnaligt kvøld, bæði fyri tónleikaáhugað, fyrrverandi næmingar, foreldur og onnur avvarðandi hjá næmingum og annars øll, sum hava hug at vitja skúlan og fáa meiri at vita.

Høvi verður at keypa sær ein kaffimunn og okkurt afturvið frá næmingum, sum savna pening til námsferð, samstundis sum til ber at síggja skúlan og fáa eitt prát við næmingar, lærarar og lestrarvegleiðarar.

Tiltakið er alment og ókeypis.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.